# UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08.01.2026 |
| Mál nr.: | 25/06858-9 |
| Málsviðgjørt: | JND |
| Ummælisfreist: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
(heimild at broyta uppskot aftaná framløgu, heimild at leggja umsiting og avgerð til annan myndugleika o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007, løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 og løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Yvirskriftin yvir § 6 verður orðað soleiðis:
“*Almenn framløga*”

**2.** Í § 6 verður aftaná “Áðrenn uppskot um ” sett: “býarskipan ella “.

**3.** Í § 6 verða stk. 6 og stk. 7 strikað.

**4.** Í § 6 verður sett nýtt stk. 6, sum verður orðað soleiðis:
“*Stk. 6.* Landsstýrisfólkið kann loyva undantaki frá kravinum um framløgu av nýggjum sambært stk. 3 og 4, tá talan er um smærri broytingar í mun til áður framlagt uppskot, sum ikki broyta megininnihaldið í ella víðka um gildisøki hjá býarskipanini ella byggisamtyktini og sum ikki víðka um heimildir kommunustýrisins.”

**5.** Aftaná § 24 verður sett:
“*Flytan av heimild*
**§ 24 a.** Landsstýrisfólkið kann við kunngerð flyta heimildir sínar sambært hesi løgtingslóg til annan myndugleika at umsita.
*Stk. 2.* Avgerðir, sum viðkomandi myndugleiki tekur vegna landsstýrisfólkið við heimild í kunngerð sambært stk. 1, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir at avgerðin er fráboðað viðkomandi parti.
*Stk 3.* Avgerðir hjá Føroya Kærustovni í kærumálum sambært stk. 2 kunnu leggjast fyri rættin sambært § 23.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri góðkenning av býarskipanum og

byggisamtyktum, sum vera latnar
landsstýrisfólkinum til góðkenningar eftir
gildiskomudagin.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir er frá 1954 og er skrivað til eitt samfelag og eina umsitingarliga skipan, sum á fleiri grundleggjandi økjum eru broytt síðani tá. Arbeitt verður við eini størri og meira grundleggjandi dagføring av lóggávuni, men hetta arbeiðið er umfatandi og verður ikki liðugt í bræði.

Fyri at fáa gongd á lógbótararbeiðið og samstundis bøta um ítøkiligar trupulleikar við galdandi lóggávu og praksis, verður mett skilagott at fremja ávísar avmarkaðar broytingar longu nú. Í hesum umfari er talan um tvær høvuðsbroytingar.

Í fyrsta lagi verður sett greið heimild í lógina til at loyva smávegis broytingum og tillagingum í uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir, eftir at tey hava ligið alment frammi. Hetta er ikki møguligt sambært galdandi løgtingslóg. Endamálið við broytingini er at gera tað møguligt hjá kommunustýrum at taka innkomnar viðmerkingar frá borgarum og áhugapørtum til eftirtektar, uttan at málið av teirri orsøk má leggjast fram av nýggjum í øllum førum.

Í øðrum lagi fær landsstýrisfólkið heimild til at leggja málsviðgerð og avgerðarførleika sambært løgtingslógini til annan myndugleika. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðsbyrðan í sambandi við býarskipanir og byggisamtyktir er stór og av einum slag, sum í dagsins samfelag hóskar betur at liggja hjá einum fakligum og óheftum myndugleika enn sum nú, í einum stjórnarráð við landsstýrisfólkinum sum evsta fyrisitara. Samstundis verður ásett, at avgerðir tiknar av øðrum myndugleika sambært heimildini, kunnu kærast til Føroya Kærustovn, soleiðis at rættartrygdin verður varðveitt ella kanska heldur styrkt.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir ásetir reglur um gerð, innihald, framløgu og góðkenning av byggisamtyktum, umframt reglur um býarskipanir. Í § 6 í løgtingslógini er ásett, at uppskot til *byggisamtyktir* og broytingar í *byggisamtyktum* skulu leggjast alment fram, áðrenn tey verða send landsstýrisfólkinum til góðkenningar. Einki er ásett um, at uppskot til *býarskipan* ella broyting í *býarskipan* skal leggjast fram til alment eftirlit.

Sambært galdandi løgtingslóg kunnu broytingar ikki gerast í uppskoti til byggisamtykt ella broyting í byggisamtykt eftir at tað er lagt alment fram sambært § 6, stk. 1. Verður uppskot broytt aftaná at tað er lagt alment fram, skal tað sambært galdandi løgtingslóg leggjast alment fram av nýggjum áðrenn tað kann vera góðkent.

Sambært galdandi løgtingslóg liggur avgerðarførleikin viðvíkjandi góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum sambært § 1, stk. 1 og § 4, stk. 1 hjá landsstýrisfólkinum. Eingin heimild er í løgtingslógini til landsstýrisfólkið at leggja avgerðarførleikan til annan myndugleika.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at fremja nakrar týðandi dagføringar í løgtingslógini, fyri at bøta um nakrar áleikandi ítøkiligar veikleikar og trupulleikar í sambandi við viðgerð og góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum.

Endamálið er:
- at tryggja almenna framløgu eisini av býarskipanum og broytingum í býarskipanum,
- at skapa eina greiða og avmarkaða heimild til at loyva smávegis broytingum í uppskotum eftir at tey hava ligið alment frammi uttan at tey skulu leggjast fram av nýggjum,
- at gera umsitingina góðkenningartilgongdina meira tíðarhóskandi og fakliga við at gera tað møguligt at flyta málsviðgerð og avgerðarførleika til annan viðkomandi myndugleika, og sum fylgja av hesum
- at tryggja eina greiða og óhefta kæruatgongd tá annar myndugleiki enn landsstýrisfólkið tekur avgerð sambært løgtingslógini.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við løgtingslógaruppskotinum verða gjørdar hesar høvuðsbroytingar:
- Býarskipanir og broytingar í býarskipanum vera fevndar av kravinum um almenna framløgu eins og byggisamtyktir longu eru tað.
- Heimild verður sett í lógina til at loyva smávegis broytingum og tillagingum í uppskotum eftir almenna framløgu, treytað av, at broytingarnar ikki broyta megininnihaldið, víðka gildisøkið ella víðka um heimildir kommunustýrisins.
- Landsstýrisfólkið fær heimild til at flyta málsviðgerð og avgerðarførleika sambært løgtingslógini til annan myndugleika.
- Ásett verður, at Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki í mun til avgerðir tiknar av myndugleika, sum landsstýrisfólki hevur latið heimildir sínar sambært løgtingslógini.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Løgtingslógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:
- Kommunufelagnum
- Umhvørvisstovuni
- Føroya Kærustovni
- Fíggjarmálaráðnum

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið viðmerkingar frá:
- ...

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Løgtingslógaruppskotið kann væntast at hava fíggjarligar avleiðingar fyri landsstovnar og kommunur.

Í tann mun landsstýrisfólkið nýtir sína heimild til at leggja umsiting og avgerðarførleika til annan myndugleika, vil tað økja um rakstrarkostnaðin hjá myndugleikanum. Uttanríkis- og mentamálaráðið metir, at samlaða arbeiðsorkan, sum í stjórnarráðnum er bundin í umsiting og viðgerð av málum um góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum liggur millum ¾ og

1 ársverk. Verður umsitingin flutt úr stjórnarráðnum lækkar rakstrarkostnaðurin í ráðnum samsvarandi.

Verður umsiting og avgerð flutt til annan myndugleika og Føroya Kærustovnur harvið verður kærumyndugleiki, fer hetta eisini at økja um arbeiðsbyrðuna og harvið rakstarkostnaðin hjá Føroya Kærustovni. Sambært § 10 a í løgtingslógini er Føroya Kærustovnur er longu kærumyndugleiki í málum har kommuna hevur tikið avgerð sambært løgtingslógini ella byggisamtykt. Við broytingini kann Føroya Kærustovnur koma at skula viðgerða kærur frá kommunum um avgerðir tiknar í sambandi við mál um góðkenning av býarskipanum og byggisamtyktum umframt aðrar myndugleikaavgerðir tiknar sambært løgtingslógini.

Fyri kommunurnar verður ikki talan nakra beinleiðis fíggjarliga avleiðing. Tó kann hugsast, at kommunur kunnu spara pening við ikki at sleppa undan at leggja uppskot fram av nýggjum og við léttari at kunna taka góðskandi viðmerkingar og broytingaruppskot til eftirtektar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Løgtingslógaruppskotið kann hava við sær broytingar í arbeiðsgongdum, serliga í sambandi við flyting av málsviðgerð og avgerðarførleika. Uppskotið krevur tó ikki stovnan av nýggjum umsitingarligum eindum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar, sosialar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Løgtingslógaruppskotið fevnir ikki um øki, sum eru regulerað av bindandi millumtjóðasáttmálum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Løgtingslógaruppskotið verður ikki mett at vera í andsøgn við Hovvíkssáttálan, Evropeiska Mannarættindasáttmálan og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Løgtingslógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Løgtingslógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Løgtingslógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Løgtingslógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Løgtingslógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Við løgtingslógaruppskotinum fær landsstýrisfólkið heimild at leggja umsiting og avgerðarførleika, ið sum sambært løgtingslógini í útgangsstøði liggur hjá landsstýrisfólkinum, til annan myndugleika. Nýtir landsstýrisfólkið heimildina merkir tað, at Føroya Kærustovnur verður kæumyndugleiki í mun til allar avgerðir tiknar við heimild í løgtingslógini.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Løgtingslógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1 (broyting av yvirskriftini yvir § 6)**
Broytingin er ein fylgja av, at ásetingarnar í § 6 við hesum uppskotinum eisini koma at fevna um býarskipanir og broytingar í býarskipanum. Yvirskriftin verður broytt soleiðis at hon

samsvarar við innihaldið í greinini og ger tað greiðari fyri bæði kommunur og borgarar, at § 6 viðvíkur almenna framløgu sum fyrisitingarligt stig bæði tá umræður býarskipanir og tá umræður byggisamtyktir. Broytingin er málslig hevur ikki sjálvstøðugan rættarvirknað.

**Til § 1, nr. 2 (víðkan av § 6 til eisini at fevna um býarskipanir)**
Við broytingini verður ásett, at kravið um almenna framløgu eisini fevnir um uppskot til býarskipanir og uppskot til broytingar í býarskipanum.

Endamálið er at tryggja, at borgarar, grannar, áhugapartar og aðrir viðkomandi fáa møguleika at seta seg inn í og gera viðmerkingar til býarskipanaruppskot, áðrenn tey verða endaliga samtykt og send til góðkenningar.

Broytingin hevur við sær, at reglurnar um framløgutíð, viðmerkingar og handfaring av innkomnum mótmælum í § 6 eisini galda fyri býarskipanir.

**Til § 1, nr. 3 (strikan av § 6, stk. 6 og 7)**
Við broytingini verða stk. 6 og 7 í § 6 strikað.

**Til § 1, nr. 4 (nýtt § 6, stk. 6 – smávegis broytingar eftir framløgu)**
Ásetingin gevur greiða og beinleiðis heimild til at loyva góðkenning av uppskotum til býarskipanir ella byggisamtyktir ella broytingar í somu, hóast smávegis broytingar ella tillagingum eru gjørda í uppskotinum, eftir at uppskotið hevur ligið alment frammi.

Ásetingin er ætlað at loysa tann trupulleika, sum er íkomin í praksis eftir at løgtingsins umboðsmaður í *áliti um góðkenning frá Umhvørvismálaráðnum av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu* frá 26.02.2024 tulkaði § 6 soleiðis, at eingin broyting kann gerast í einum uppskoti eftir framløgu, uttan at uppskotið verður lagt fram av nýggjum í síni heild, uttan so "*at talan [er] um sama innihald, tó við eitt nú broyttum orðavali ella rætting av stavivillum*". Hetta hevur í praksis havt við sær, at kommunur heldur velja at síggja burtur frá innkomnum viðmerkingum og broytingaruppskotum, heldur enn at taka tær við og leggja málið fram av nýggjum.

Heimildin er tilvitað sera avmarkað. Tað er ein treyt, at:
- broytingarnar eru smávegis í mun til áður framlagt uppskot,
- broytingarnar ikki broyta megininnihaldið í uppskotinum,
- broytingarnar ikki víðka um gildisøkið, og
- broytingarnar ikki víðka um heimildir kommunustýrisins.

Um broytingarnar ganga út um hesar karmar, skal uppskotið leggjast fram av nýggjum sambært vanligu reglunum. Ásetingin skal tulkast restriktivt, og hon er ikki ætlað at verða brúkt til grundleggjandi ella prinsippiellar broytingar eftir framløgu.

Endamálið er at skapa eina virkisføra javnvág millum demokratiska luttøku og skilagóða fyrisiting.

**Til § 1, nr. 5 (§ 24 a – flytan av heimild og møguleiki at kæra)**
Við nýggju § 24 a fær landsstýrisfólkið heimild til, við kunngerð, at flyta málsviðgerð og avgerðarførleika sín sambært løgtingslógini til annan myndugleika.

Ásetingin ger tað møguligt at nútímansgera umsitingarligu skipanina og ábyrgdarbýti. Í dag eru stjórnarráð fyrst og fremst skipað til politiska leiðslu og ráðharraveiting, meðan faklig málsviðgerð og einstakar fyrisitingarligar avgerðir vanliga liggja hjá undirliggjandi stovnum.

Mál um býarskipanir og byggisamtyktir eru ofta teknisk, faklig og ítøkilig og krevja serkunnleika og samanhangandi praksis. Arbeiðsbyrðan er harumframt stór. Tað verður tí mett bæði virkisliga og bygnaðarliga skilagott at gera tað møguligt at leggja hesar uppgávur til annan myndugleika enn stjórnarráðið og landsstýrisfólkið.

Í stk. 2 verður samstundis tryggjað, at avgerðir tiknar við slíkari heimild kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Hetta er í samsvari við meginregluna um, at fyrisitingarligar avgerðir skulu kunna roynast av kærumyndugleika.

Í stk. 3 verður gjørt greitt, at møguleikin at royna mál í rættinum sambært § 23 eisini verður galdandi fyri avgerðir hjá Føroya Kærustovni.

**Til § 2 (gildiskoma)**
Ásetingin ásetir, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður ásett, at broytingarnar bert galda fyri uppskot til býarskipanir og byggisamtyktir, sum verða latnar inn til góðkenningar eftir gildiskomudagin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, xx.xx.2026

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen, aðalstjóri

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: